VIÐMERKINGAR

# Hvussu við trivnaðinum ?

**Marni Olsen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Tvøroyrar býráð Sí www.suduroy.nu*




At bjóða seg fram, sum valevni til komandi býráðsval er ikki lætt, tí tað eru so nógv ymisk viðurskifti, ein eigur at hugsa um. Tá talan er um samfelagsviðurskifti, má man vita, at raðfestir man eitt øki høgt, er avleiðingin, at eitt annað øki kann blíva fyri vanbýti. Tí er umráðandi at tær raðfestingarnar, sum verða gjørdar, eru væl umhugsaðar. Fráflytan og ørkymlan hevur higartil verið ein alt ov stórur partur av gerandisdegnum á Tvøroyri. Tað er eitt týðiligt tekin um, at trivnaðurin ikki er í lagi á plássinum. Og hvat er so trivnaður? Í mínum hugaheimi er tað millum annað:

- at fólk hava eitt trygt arbeiði
- at børnini ikki eru í vanda í ferðsluni
- at ungdómurin hevur tryggar karmar at virka og mennast undir í frítíðini
- samstarv

Um vit taka arbeiði fyrst, so er ein stórur trupulleiki hjá teimum, sum flyta til Tvøroyrar, at lítið og onki arbeiði er at fáa, serliga til kvinnur. Hetta er ein stórur trupuleiki, sum eitt komandi býráð má raðfesta høgt at fáa loyst. Tí má alt gerast, fyri at betra um vinnumøguleikarnar, bæði innanfyri tað privata og tað almenna.

Ungdómurin á Tvøroyri hevur sera ringar umstøður fyri at virka og mennast. Tí er umráðandi at fáa skapt tryggar, spennandi og mennandi karmar, fyri einum ungdómsumhvørvi her á Tvøroyri. Tildømis við at fáa nýtt gomlu heilsøluna á Hvítanesi, til okkurt, sum líkist Margarinfabrikkini í Havn. Møguleikin fyri at tey ungu venda aftur til Tvøroyrar eftir lokna útbúgving, er nógv størri, um tey hava góð minnir frá teirra ungdómstíð á Tvøroyri.

Børn og vaksin til gongu ella á súkklu, eru í sera stórum vanda á vegunum á Tvøroyri. Gongubreytir eru ongar í stórum parti av býnum, umframt at als onki er, sum forðar skilaleysu koyringini, sum vit alt ov ofta eru vitni til. Tí er neyðugt at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Vit borgarar á Tvøroyri hava ofta eina kenslu av, at gingið verður í fleiri bólkum her á staðnum. Neyðugt er, at komandi býráðslimir eru førir fyri, at ganga undan í samstarvi, til tess, at savna allar góðar kreftir, Tvøroyri at frama. Líka so neyðugt er, at samstarvið við Landsins myndugleikar er betri, enn vit ofta hava varhugan av, at tað er. Býráðið eigur, bara, at seta seg inn í, hvørjar lógir og reglur, eru galdandi á ymisku økjunum. Ongin grund er til, at brúka tíð og orku hjá býráðnum, til at stríðast við myndugleikarnar, sum vit sóu tað í málinum um frítíðarskúlan.

Hesi mál eru so nøkur teirra, sum takast mugu upp, til tess at betra um trivnaðin á Tvøroyri. Nógv onnur mál eru eisini at tríva í, og uppaftur onnur fara at koma fram. Tí er neyðugt, at verða fleksibul, og kunna seta seg inn øll mál, stór og smá, tora at hugsa ótraditonelt, og síggja møguleikar, tá nýggjar støður stinga seg upp.

# Teir grønu blettirnir skulu varðveitast

**Steinfinnur Mittelstein**
*Valevni Sambandsfloksins til Tórshavnar Býráð*




Býráðspolitikarar eru farnir alt ov lætt um byggisamtyktir og sølur av ognum, ið kommunan átti at varðveitt grønar.

Tað er neyðugt at hugsa seg um, tá størri avgerðir skula takast, soleiðis er í øllum lívsins viðurskiftum. Eisnini kommunan skal hugsa seg um, og hava eina ætlan, tá loyvið verða givin at byggja bygningar á sethúsaøkir. Eisini er avgjørt neyðugt, at kommunan viðgerð og metir um, tá kommunan skal selja økir sum liggja í miðbýinum. Seinastu árini hava vit, alt ov ofta, verið vitnið til óskil á økinum. Ein hevur tað fatan, at ongin skipað mannagongd er, og tí vísir tað seg at vera alt ov tilvildarligt. Her eigur at verða gjørdar púra greiðar reglar, so tann sum skal byggja, veit akkurát hvat hann kann gera við ognina.

Tíverri hava vit seinastu árini verið vitni til, at alt ov nógv "grøn" økir í býnum verða seld til sethúsabygging. Tað er harmiligt t.d. at síggja ognina hjá Torvaldi Poulsen á R.C. Effersøesgøtu (lýkt einum spøkilsishúsið), liggja sum ein skomm fyri kommuna og stóran ampa fyri grannarnar. Hesin hugnaligi gartnarin, læt alla sína ogn og pening til at stuðla ungum listarfólkum í Føroyum. Hevur hann ikki betur uppiborið ??

Vøkur rundkoyring er gjørd uttan fyri SMS, og partur av trøðunum, sum tá stóðu í garðinum hjá Torvaldi, prýða nú økið. Men so er tað restin av grundøkinum, har húsini standa. Húsini eru sanniliga ikki nakað prýði fyri býin, tvørtur ímóti.

Hví skuldi kommunan selja økið — Ótrúligt og óskiljandi!!

Hví bleiv húsið ikki tikið niður saman við drívhúsunum, økið fríðka, ein minnisvarði settur eftir hendan mentamann, og so kundi økið verði nýtt til mentunarliga endamál, til gangs fyri allar borgararnar.

Kommunan eigur alt fyri eitt, at viðganga mistakið, taka upp samráðingar við eigaran, og fáa fatur á økinum aftur. Síðan skal gerast ein ætlan fyri økið, so hettar kemur øllum borgarunum í býnum tilgóðar, og Torvaldi Poulsen til heiðurs — tað hevur hann uppborið.

Hetta vil eg arbeiða fyri.

# Bíðilistin til ellis- og røktarheimpláss skal burtur

**Annfinn Brekkstein**
*valevni fyri sambandsflokkin til býráðsvali í Havnar Kommunu.*




Skal bíðilistin í til ellis- og Røktarheim burtur er tíðin komin at viðgera, um tað ikki er gongd leið við einari økislóg fyri eldraøkið Tórshavnar Kommunu. Við eini økislóg fáa vit eitt greitt ábyrdarbýti millum land og kommunu.

Verður eldraøkið kommunalt kann kommunan tá sjálv loysa uppgávurnar á eldraøkinum. Tá er tað kommunan einasmøll, sum hevur ábyrgdina av at útvega nokk av ellis- og røktarheimplássum í kommununi. Tá er tað ein prioritering og raðfesting hjá kommununi hvussu skjótt hon vil hava bíðilistan burtur.

Vit kunna ikki longur bíða eftir at eldraøkið, sum er ein landsuppgáva verður loyst av landsmyndugleikunum. Nógvar kommunur eru ikki nóg stórar at loysa uppgáur, á eldraøkinum. Vit í Tórshavanr kommunu kunna ikki bíða eftir minsta felagsnevnara og landsmyndugleikunum. Tað gongur út yvir okkara eldru tað kunna vit ikki bjóða teimun.

Tórshavnar Kommuna og aðrar kommunur hava víst í verki, at eitt nú tá barnaansingin bleiv løgd út til kommunurnar at umsita, megnaðu tær uppgávurnar. Í Tórshavnar Kommunu er tørvurin á ansingarplássum nærum nøktaður.

Mín sannføring er at eldraøkið má umsitast í størri kommunalum eindum, um tað skal umsitast á ein nøktandi hátt. Í Tórshavnar kommunu búgva uml. 19.000 hettar er næstan helvtina av føroyingum. Tí er tað neyðugt at kommunan sjálv fær ábyrgdinia av eldraøkinum. Øll í kommununi, sum hava brúk fyri ellis- og røktarheimsplássi, skulu hava eitt ávíst og rættvíst tænastustøði. Hettar er einki meira enn ein sjálvfylgja í 2004.

Skulu vit hava bíðilistan burtur í Tórshavanr kommunu er neyðugt at eldraøkið verður kommunalt. Kommunan hevur fíggjarliga grundarlagið í lagi og kann kommunan sjálv loysa uppgávuna.

Hesum vil eg sum valevni til arbeiða miðvíst fyri.

Mín áskoðan er tann, at eldraøkið verður betur og bíligari umsitið, um tað verður lagt út til kommunurnar at umsita.

# Professionella Havnin í Tórshavn

**Johan Mortensen**
*Valevni Tjóðveldisfloksins til Býráðið*




Í ár komu 47 ferðamannaskip á Havnina við yvir 20.000 ferðafólkum Alt gekk væl. Tey sum eiga heiðurin er tað sera professionella liðið í Havn av loðsum, bryggjufólki, tollarum, løgreglufólki, læknum, sjúkrasystrum, tannlæknum, bankum, bussførarum og ferðaleiðarum,

Sjálvur umboði eg fleiri av hesum skipum. Vit skulu hava nógv fleiri skip á Havnina í komandi árum og handilslívið í Havn skal fáa meira pening burturúr cruise-vinnuni.

Vit eru kortini professionel í Tórshavn, yes sir !!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.



VIÐMERKINGAR

# Rådgivning om det valg der ikke eksisterer!

**Hanne Bille**
*Kvindeligt Selskab*



**Færøsk ministerielt udvalg skal rådgive gravide færøske kvinder om abort**

Landsstyreformand Hans Pauli Strøm (SocDem) vil nedsætte en rådgivningsgruppe, der skal rådgive kvinder, der "overvejer abort". Hensigten med gruppen er, at "kvinderne kan få neutral rådgivning fra en eller flere personer i gruppen, så de bliver bedre rustet til at tage en beslutning".

"Fra Kvindeligt Selskab er vi uforstående over for den planlagte rådgivningsgruppe, for hvordan kan man blive rådgivet om et valg, man reelt ikke har. Der eksisterer jo ikke fri abort på Færøerne, så kvinderne kan i praksis kun vælge mellem ikke at få en abort og ikke at få en abort!", siger Hanne Bille, forkvinde for Kvindeligt Selskab.

Gruppen skal foruden en læge, en psykolog og en socialrådgiver også inkludere en "præst".

"Hvad en præst har at gøre i en rådgivningsgruppe, kan vi ikke se, for det skal jo forestille at være neutral rådgivning, kvinderne skal modtage. Mon ikke vi alle ved, hvor en færøsk præst står på dette område?", siger Hanne Bille.

"I stedet for at forsøge at stille både kvindeorganisationer og religiøse politikere tilfredse burde færingerne i stedet ændre lovgivning, så kvinderne reelt får et valg. Dette er bare en skinmanøvre og et forsøg på at lægge låg på en debat, der virkelig er brug for på Færøerne", siger Hanne Bille.

"Og hvordan vil rådgivningsgruppen mon stille sig, hvis kvinden ønsker en abort? Vil de så rådgive hende om, hvordan det kan lade sig gøre – altså at tage til Danmark?", slutter forkvinden der da gerne ser de færøske politikere bakke op op Kvindeligt Selskabs pengeindsamling men ikke er videre optimistisk efter reaktionerne fra den færøske elite.

Kvindeligt Selskab ser i øjeblikket ingen afgørende forskel på dette forslag og så forslaget om et abort "tribunal" fra den fundamentalistiske politiker Bill Justinussen. Læs mere på www.abortnet.dk "Det skylder vi Gud"

For yderligere kommentar kontakt : Hanne Bille, Kvindeligt Selskab, Tlf. 40581627

Læs også om indsamlingen til abortsøgende færøske kvinder på www.kvindeligtselskab.dk

# Á Argjum nærkast skúlabygging og ítróttarhøll!!!

**Eyðun á Borg**
*Argir*



*Kollafjørður, Kaldbak, Hoyvík, Tórshavn og Velbastaður: Til lukku við tykkara skúlabygging!*

*Kollafjørður og Hoyvík: Til lukku við tykkara hallabygging!*

Fyri nøkrum árum síðani vóru vit á Argjum nr. 2 í skúlabyggingarraðnum! Hví vit vórðu koyrd afturum og ikki verða tikin upp á tungu nú, dugir kanska onkur býráðspolitikari ella -valevni at greiða okkum frá!?!

Men tolin trívst! Vit á Argjum ugga okkum við, at tá øll onnur í kommununi nú hava fingið sínar skúlabyggingar, so man okkara vera rættiliga nær! Eg haldi meg vita, at ítróttarhøllin á Argjum eisini er rættiliga nær!?!

Hugaligt er eisini at vita, at Tórshavnar kommuna nú er skuldarleys og hevur avgreitt barnaansingartørvin, so pengar tróta ikki!

**Argir eru jú staðið!**

Ein lítil heilsan til Argja róðrarfelag og Argja bóltfelag!

Argjabáturin, Blikur og Blikur: Hjartaliga til lukku við teimum glæsiligu føroyameistaraheitunum í 2004! Næstu ferð verður tað, Lómur!

Argja bóltfelag: Hjartaliga til lukku við føroyameistarunum! Skjótt koma menninir upp í 1.deild!

E.S.! Hans Jákup! Takk fyri tann nýggja argjasangin!

Við skúla- og ítróttarkvøðu.

# Føroya Løgmaður - takk fyri svarið

**Edmund Joensen**



Takk fyri svarið og frágreiðingina um orðsøkina til at føroyingar ikki koma at taka lut í stóra ídnaðar- og søluframtakinum í sambandi við at hennara hátign Margreta Drotning vitjar Japan i november mánaða komandi.

Løgmaður tykist verað væl nøgdur við sína egnu handfaring av innbjóðingini og úrslitið av hesi handfaring.

Sum skilst á svarinum frá Løgmanni er høvuðsorsøkin til at eingin fer til Japans henda: Landstýrismenn og vinnulívsmenn hava svara løgmanni, at **"ongi ítøkilig áhugamál eru í Japan í løtuni"**. Hetta var svarið frá teimum sum hava ábyrgd av landsins stýri og av vinnuni í Føroyum.

Hevur nakar hoyrt so skapt? Japan, landið sum flýtur í mjólk og hunangi. Har búgva 127 millónir fólk. Landið er førandi tá ið um framburð og menning ræður. Talan er um næsstørsta búskapin í heiminum og størstu valutagoysluna í heiminum. Landstýrið og vinnan svara løgmanni stutt og greitt! **"ongi ítøkilig áhugamál í løtuni"**. Og løgmaður er væl nøgdur. Sigur hetta ikki meira um okkara støði á politiska økinum, á vinnuliga økinum og á menningarliga økinum enn ein kann lýsa við vanligum orðum?.

Tá ið eg las svarið frá løgmanni, rann mær í huga gomlu søguna um sølumennirnar á sinni, sum sendir vórðu til Afrika at selja skógvar. Seljarirnir báðir, sum hvør í sínum lagi mettu um marknaðin á staðnum, telegraferaðu heim til skógvaverk-smiðjuna í Evropa. Annar segði, at í Afrika var ongin skógvamarknaður, tí her brúkti ongin skógvar. Hin seljarin telegraferaði algoystur heim, at her var stórur og nærum óendiligur marknaður fyri skógvar, tí øll gingu berfótt, øllum afrikanarum tørvaði skógvar. Tað ráddi um at fáa ferð á framleiðsluna har heima — ongantíð ov skjótt.

**"Ongi ítøkilig áhugamál eru í Japan í løtuni"**. Tá í ein lesur hesa fráboðan til løgmann kennist tað næstan sum ein hoyrir ekkóið frá tí fyrrnevnda skógvasølumanninum. Ongin tørvur á skóm til nógvar milliónir av berføttum. Mítt svar er, at tað velst altíð um eyguni sum síggja, soleiðis eisini við japanska marknaðinum og við japanska samfelagnum í heila tikið.

Alt byrjar jú við at sambond verða stovnað, sum so aftur eru fremjandi fyri samvinnu og samhandil. Tað er sera umráðandi alla tíðina at víðka um sjónarringin. Somuleiðis er tað eisini sera umráðandi at brúka møguleikan tá íð høvið bíðst fyri at læra av øðrum.

Læt meg eisini minna á, at tað mær vitandi er løgmaður sjálvur sum fær innbjóðingina at verað við á drotningavitjanini. Tað er eisini hann sum sjálvur avgerð um nakað átak skal gerast Føroya vegna ella ikki.

Eg skal ikki dylja fyri at eg er sera keddur av at føroyingar ikki brúka slíkar møguleikar sum hesar.

Er hetta ikki eitt prógv um tann stóra politiska, vinnuliga og menningarliga trupuleikan sum Føroyar hava.

Rætt skal vera rætt. Kann verða at ein millum linjurnar kann skilja á løgmanni, at hann kortini ikki er heilt nøgdur við passivitetin hjá landsstýrismonnum og vinnu-lívsmonnum í málinum, og at hann frá nú av ætlar sær at takað sakina í størri álvara. Og tað skal hann hava tøkk fyri.

P.S. Sjálvur havi eg fingi bæði skrivligar og munnligar fyrispurningar um hvussu sleppast kann uppí part á ætlaða japantúrinum.

# Borgarstjórin – Steinbjørn O. Jacobsen – avdúkar sín rangvørga hugburð

**Abraham Mikladal**



**Í Dimmalætting 14. okt. sigur borgarstjórin, at býráðsumsitingin einki hevur at skammast yvir, eftir at bæði Innlendismálaráðið, Løgtingsins Umboðsmaður og Landsins býarskipanarnevnd hvassliga hava átalað málsviðgerðina hjá umsitingini og ógildað ólógligt byggiloyvi.**

Í staðin fyri at viðganga at grovir feilir eru gjørdir, kanska fyrst og fremst av teknisku umsitingini (byggifulltrúanum / býarverkfrøðinginum), men ikki minst av borgarstjóranum sjálvum, so verður alt bara kveistrað til viks, sum eitt úrslit av øktum eftirliti.

Borgarstjórin sigur m.a. í Dimmu, "at atfinningarnar heldur skulu setast í samband við økt eftirlit. Tað verður hildið meira eyga við kommununum eins og við t.d. tí, sum landsstýrismenninir gera."

Henda grundgevingin er heilt burturvið. Lat okkum taka eitt líknilsi:

Peningur verður regluliga stolin í eini fyritøku, har fleiri fólk starvast. Í langa tíð er eingin greiður yvir, hvat hendir, tí tað er leiðslan og partar av teimum í umsitingini, sum fremja stuldurin. Eingin kunning um virksemið hjá leiðsluni verður latin partaeigarunum, og teir fáa og hava einki innlit. Nevndin í fyritøkuni er vitandi um at alt ikki gongur reiðiliga fyri seg, men velur at stuðla leiðslu og umsiting.

Men ein dagin leggur ein av partaeigarunum til merkis, at okkurt er sum tað ikki eigur at vera. Partaeigarin kannar viðurskiftini nærri og fær vissu fyri, at okkurt óregluligt gongur fyri seg. Partaeigarin setur seg í samband við løgregluna, sum skjótt staðfestir, at leiðslan, saman við parti av umsitingini hevur stolið pening úr fyritøkuni í longri tíð, og at hetta eri farið framm við góðkenning og vælsignilsi frá nevndini.

Leiðslan sigur, at tað einki hevur upp á seg. Tað at hava stolið peningin er einki at skammast yvir, tí avdúkingin er bert ein partur av øktum eftirliti.

Men sig mær - er ógerðin ikki akkurát líka stór, um hon verður avdúkað ella ikki????

Avleiðingin fyri leiðslu og umsiting og kanska nevndina við, hevði verið:

- bót ella hefti
- áløgd at rinda fult endurgjald

og óivað høvdu partaeigararnir koyrt nevndina, leiðslu og umsiting frá, upp á standandi fót.

So Steinbjørn O. Jacobsen, eg vóni at tygum skilja líknilsi. Tygum átti at "kropið til krossin" og viðgingið tygara mistøk. Somuleiðis átti tygum at ruddað upp í teknisku umsitingini.

Og hav í huga, at hetta er bert toppurin av ísfjallinum.